LM-008/2020

LØGTINGIÐ

Løgtingsformaðurin

Uttanlandsnevndin

22. oktober 2020
j. nr. Lm.nr. 8/2020
(at tilskila í svari)

Leingjan av freist til framløgu av áliti í løgtingsmáli nr. 8/2020: Uppskot til løgtingslóg um broyting í løgtingslóg um ræði á málum og málsøkjum (Yvirtøka av málsøkjunum landslæknaembæti, eftirlit við heilsustarvsfólkum og stovnum á heilsuøkinum, sjúkufyribyrging, sinnissjúkraviðurskifti, líkskoðan, vevnaðarflutningur, euforiserandi evni, sjúklingarættindi og eftirgjørdur gitnaður)

Uppskotið var til 1. viðgerð tann 3. september 2020, og eftir hetta varð tað beint Uttanlandsnevndini. Nevndin hevur viðgjørt málið á tveimum fundum og havt fleiri innkallingar. Nevndin ætlar at hava nakrar innkallingar afturat, áðrenn álit verður skrivað.

Formaðurin fer tí hervið at heita á løgtingsformannin um at leingja freistina sbrt. § 32, stk. 2 í Tingskipanini til 20. november 2020.

Vegna nevndarformannin

Rannvá Sólheim
nevndarskrivari

Játtað
22/10-20
Løgmaður.

TINGHÚSVEGUR 1-3
POSTBOKS 208
100 TÓRSHAVN
TLF. 363900
FAX. 363901

LOGTING.FO